## Connie í Paradísi í kvøld



Connie Brockie úr Vági verður at síggja á skíggjanum hjá TV3 í kvøld klokkan 21, tá ið sendirøðin Paradise Hotel heldur fram. - Eg gleði meg at síggja meg sjálva á skíggjanum, men eg eri rættiliga fjálturstungin fyri, hvat føroyingar fara at halda, sigur Connie Brockie. Tað eru fleiri mánaðir síðani, at Sosialurin kunngjørdi, at Connie Brockie var við í Meksiko, tá ið afturvendandi sendirøðin Paradise Hotel bleiv framleidd. Síðani tá hava føroyingar bíðað í spenningini eftir at síggja Connie á skíggjanum, og umsíður verður tað til veruleika. - Eg fari í Bowlinghøllina í Havn at hyggja eftir fyrstu sendingini við mær í, og øll vinfólk og áhugað annars eru vælkomin við, sigur Connie Brockie. Bowlinghøllin vísir fyrstu sendirøðina á stórskíggja.



*Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, og Tórbjørn Jacobsen, tingmaður, eru rúkandi ósamdir um minstulønina, sum manningin á línuskipunum í løtuni livir fyri*

# Landsstýrið rørir ikki minstuløn

**Hóast tað hevur verið viðgjørt í samgonguni, so verður minstalønin ikki rørd, nú tíðirnar hjá fiskivinnuni kundu verið betri**

FISKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

- Vit hava diskuterað ymiskt við, hvat skal gerast við stuðulsskipanirnar til sjófólk, men onki verður gjørt, tí argumenterað varð fyri, at tað er til tíðir sum hesar, at minstalønin skal nýtast, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum.

### Minni minstaløn

Jacob Vestergaard greiðir frá, at tá minstalønin varð viðgjørt í samgonguni fyrr í ár, við tí fyri eyga at spara eitt sindur av peningi, so var ætlanin, at tey, ið klára seg rímiliga væl, skuldu missa ein part av stuðlinum, men at manningin, sum veruliga lítið fekk, eisini fekk eitt sindur meira.

Hetta uppskotið kom tó ongantíð niðan í tingið, tí semja ongantíð varð um at broyta skipanina.

- Vit tosaðu um at broyta frymilin, men argumentið við, skipanin er gjørt til tíðir sum hesar, so varð avgjørt, ikki at leggja uppskotið fyri ting, greiðir Jacob Vestergaard frá.

# Landið heldur oyðandi flota uppi

**Tórbjørn Jacobsen, tingmaður fyri Tjóðveldi og fyrrverandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum, er framvegis sannførdur um, at allar stuðulsskipanir skulu burtur. – Vit hava veitt ov nógv, og nú verða almennir pengar pumpaðir inn í flotan, sum halda honum uppi, sigur hann**

FISKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tá Tórbjørn Jacobsen var landsstýrismaður í fiskivinnumálum varð arbeitt við at minka um stuðulin til sjófólkið, og fyri næstan einum ári síðan greiddi hann frá, at ongin almennur stuðul skuldi latast fiskiflotanum, og hetta heldur hann fast við.

- Tað er so nógv fiskiorka á sjónum, at næstan onki skip klárar at bera seg, greiðir hann frá.

Somuleiðis metir hann, at tað er sjómannafrádráttur og minstaløn, sum heldur skipunum gangandi, og at tað ikki er ein gongd leið, at halda skipum uppi við almennum peningi, tí hetta bara hevur við sær, at tá stovnarnir byrja at koma fyri seg aftur, so verður ein alt ov stórur floti at veiða uppaftur.

### Leivdir frá fortíðini

Eisini er Tórbjørn Jacobsen av tí áskoðan, at minstaløn og sjómannafrádráttur, eru leivdir frá fortíðini, sum mann ikki megnaði at skera burtur frá hálvfemsunum, tá kreppa seinast var í flotanum.

- Fyri at sleppa av við hesar leivdir kundi mann flutt minstulønina inn í arbeiðsloysisskipanina, og so skuldi mann samstundis givið manningunum fasta løn og bonus, um tað gekk serliga væl. Vit eru einasta land á okkara leiðum, sum heldur fast við hesar leivdirnar frá veiðumentanini, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Hinvegin greiðir Tórbjørn Jacobsen frá, at føroyingar vanliga koma rímiliga væl burturúr kreppunum, men hann metir prísin vera ov høgan.

- Seinast mistu vit 7000 fólk, og tað hava vit ikki ráð til fleiri ferðir, metir hann, og hetta kann fyribyrgjast við eini javnari veiðu við minni veiðitrýsti.